# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Málningaframsýning í Ribarhús í Fuglafirði




TÍÐINDASKRIV

Høgni Thomsen hevur málningaframsýning í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði.

Framsýningin er sera forvitnislig, og er avgjørt eina vitjan verd.

Við eru 24 oljumálningar.

Framsýningin er opin fram til 21.juni 2006. Opið er mán-fríg. kl. 15.00 til 17.30 leygardag frá kl. 11.00-13.00.

Høgni hevur eina heimasíðu www.gluggin.com.

## Til minnis um okkara høgt virda nábúgva og vin Brynhild Hansen



Sjálvt um tað nú er tíð fráliðin, síðan tú andaðist, vilja við tó koma við koma við við eini seinastu heilsan til tín. Nú er heldur tómligt í túninum,friður hevur lagt seg yvir grannalagið, men er tað salur friður? Nei slett ikki, røddir mangla.

Tá vit komu út á Lið,fyri meira enn fimtan árðum síðan, tóktist alt at anga av lívi, nógv fólk, lív, alt tyktist so nærliggjandi.

Vit, eini ung hjún tá,við einum barni, elskaðu hetta umhvørvið, fólk við nógvum lívsroyndum,bæði góðum og minni góðum, tað gav íblástur. Hvat stóð okkum fyri framman?

Tó við eitt rakti sjúka okkum, hví? vit vóru jú yngsta ættarlið, Gott er at hava góðar vinir,tað fingu vit at sanna.

Sjálvt um hálvtrýss ár vóru millum Nomi og Brynhild, knyttu tær vinarbond fyri livið, hettar vinarband var serstakt, gongdin húsana millum var lívgevandi, sjálvt um ofta torførar støður vóru, bæði hjá tær og okkum.

Brynhild var eitt serstakt menniskja, lagnan var ikki altíð so blíð móti henni, menniskjaligi missurin var stórur, tó hettar bar hon við tolsemi, helst tí at hon frá skaparans hond hevði fingið ein útrustning, ikki øllum er givið,tolsemi.

Sjálvt um aldurin var vorðin høgur, trúðu vit, at Brynhild fór at vera her í mong ár frammyvir, men so var ikki, við eitt var hon kallað heim til ein betri stað.

Hennara blíða lyndi og tann hugni hon bar við sær inn í okkara heim er ikki longur "ætt eftir ætt søkkur undir mold". Men eitt skal tú vita,vit sakna teg.

**Heilsan Nomi og Holgar**

## Gracia Burnham til Føroyar

**Í summar fáa vit í Føroyum vitjan av Graciu Burnham úr USA, sum kemur at greiða frá tá hon og maðurin, Martin Burnham, ið var flogskipari hjá New Tribes Mission á Filipsoyggjunum, vóru gíslar í næstan tvey ár. Martin kom ikki undan við lívinum**



*Gracia Burnham vitjar í Føroyum í døgunum 24. juli til 9. aug.*

TÍÐINDASKRIV

Í døgunum 24. juli til 9. august fáa vit í Føroyum vitjan av Graciu Burnham úr Kansas í USA, sum kemur at greiða frá hendingunum, ið henni vóru fyri, tá hon og maðurin Martin Burnham, ið virkaðu sum trúboðarar og vígdu lív sítt at hjálpa fátækum, vóru gíslar árini 2001 og 2002. Martin var flogskipari hjá trúboðanarfelagsskapinum New Tribes Mission á Filipsoyggjunum.

Á vári 2001 vóru Martin og Gracia har suðuri í landinum, á oynni Palawan, hetta var í arbeiðsørindum í sambandi við hansara tænastu sum flogskipari. Tá hetta fall saman við einum merkisdegi hjá teimum báðum, gjørdu tey av at taka sær nakrar dagar frí frá trúboðanarverki teirra til tess at hátíðarhalda 18 ára brúdleypsdagin. Hesir frídagar á einum feriustaði har, vendust til eina óhugnaliga gíslatøku. Tey bæði vórðu tikin gíslar, og vóru hildin sum fangar av einum yvirgangsbólki í meira enn eitt ár. Í eini roynd at fría tey, varð Martin Burnham dripin.

Nógv í Føroyum fylgdu við í hesum óhugnaliga drama og bóðu fyri teimum. Hjúnini áttu 3 børn. Børnini vórðu eftir hjá skildfólki í Manila, tá hendingin fór fram og vórðu tey stutt eftir, at foreldrini vórðu tikin gíslar, flutt til Sameindu Statirnar, har tey vórðu hjá ommu og abba teirra alla ta tíðina, sorgarleikurin fór fram. Fleiri føroyskar familjur vóru á Filipsoyggjunum um hetta mundi, tá hendingarnar fóru fram.

Føroyavitjanin kom í lag í Manila á nýggjárinum í 2004, har Gracia Burnham varð boðin at koma til Føroya. Tað eru Jógvan Zachariassen og Ólavur Jøkladal (NTM), sum samskipa ferðina, og aftanfyri stendur føroyska nevndin fyri New Tribes Mission. Ragnar Niclasen verður í Føroyum meðan vitjanin er, og hann verður millum annað at hoyra í Ebenezer ólavsøkumorgun.

Í sambandi við vitjanina verða ymisk tiltøk runt um í landinum. Høvuðstiltakið, ið vendir sær til øll, verður í Ítróttarhøllini á Eiði týsdagin hin 1. august. Hetta verður eitt kvøld, har skipað verður fyri tónleikaframførslum. Her verður eitt serligt høvi hjá fólki at kunna seg um trúboðan. NTM fer at sýna tilfar um virksemi hjá felagsskapinum, og Logos bókahandilin kemur at hava eit úrvæl av bókum, har ímillum bøkurnar, Gracia Burnham hevur skrivað: "In the Presence of My Enemies" og "To Fly Again". Gracia verður eisini at hoyra í Betesda í Klaksvík, hetta tiltakið fer serliga at venda sær til ungdómin, tó rokna fyrireikararnir við, at øll fara at kenna seg vælkomin til hetta tiltakið eisini. Eitt møti verður í Lívdini í Hoyvík, og í sambandi við eitt kvinnutiltak verður ein dagur fyri kvinnur í Ebenezer í Havnini. Í suðuroynni verður eitt møti, ið kemur at fevna um alla oynna, og verður hon eisini á tveimum av barnalegunum í Zarepta. Meðan Gracia Burnham er í Føroyum, fáa fólk, ið hava eitthvørt tilknýti til NTM, høvi at møta henni, hetta verður meiri at kalla "ntm-familjan". Tað eru fólk, ið hava verið úti á trúboðanarmarkini ella í venjing hjá felagsskapinum. Umframt hetta verður skipað fyri tíðindafundi, har høvi verður hjá tíðindafólki at seta spurningar til Graciu Burnham.

Gracia býr í dag saman við børnum sínum í USA. Hon hevur ferðast nógv runt í heiminum og sagt frá um tær hendingarnar, hon hevur verið úti fyri, og hvussu tær hava broytt hennara lív. Eftir hesar hendingar hevur Gracia givið út tvær bøkur: Í Nærveru Fíggindans (In the Presence of My Enemies), og Aftur á Flog, (To Fly Again). Tíðindasending hjá sjónvarpsrásini NBC, Dateline, segði herfyri frá søguni um trúboðarahjúnini hjá NTM, Martin og Gracia Burnham.



*Ása Jøkladal (v.m.) og Gracia Burnham á trúboðanarráðstevnu í Manila januar 2005*

## Maria Mørkøre í Leikalund



*Fríggjakvøldið 16. juni kl. 19 letur ein framsýningin hjá Mariu Mørkøre, listakvinnu, upp í Leikalund í Klaksvík*

TÍÐINDASKRIV

Fríggjakvøldið 16. juni kl. 19 letur ein framsýningin hjá Mariu Mørkøre, listakvinnu, upp í Leikalund í Klaksvík.

Maria Mørkøre er úr Klaksvík. Hon hevur gingið á Listaskúla í Danmark, og hevur teknað og málað síðani 1996. Seinastu árini hevur listin meira ella minni verið hennara livibreyð. Maria undirvísir eisini í tekning og máling og fæst við ymiskt annað kreativt. Málningarnir, hon sýnir á hesi framsýning, eru flest oljumálningar, har hon lýsir menniskju, bygdaløg og føroysku náttúruna. Maria sigur at hon heilt tilvitað fæst við ta klassisku listina, tí hon leitar eftir vakurleikanum í menniskjanum og í tí skapta.

Fernisering er ókeypis og verður fríggjakvøldið 16. juni kl. 19, framsýningin heldur fram juni mánað út. Upplatingartíðirnar hjá Leikalund eru hesar: mán.-leyg. 10- 20, sun. 16-20.